# Talvið hesa vikuna

IM Oleg Kulicov (2402) - Martin Poulsen (2285) 7th Dubai Open 2005 (6. umfar), 09.04.2005

1.Rif3 d5 2.c4 e6 3.g3 c6 4.b3 Hvítur leikar varliga Be7 5.Bb2 Bf6 6.Ric3 e5! 7.d3 d4 Martin hevur lættliga javnað út, hann stendur kanska betur 8.Rib1 c5 9.b4 cxb4 10.a3 bxa3 11.Bxa3 Hevur hvítur fingið nakað burturúr finnuoffrinum? Eg ivist stórliga... 11...Ric6 12.Ribd2 Be7 13.Bg2 Rif6 14.0—0 0—0 15.Fa4 Bd7 16.Rfb1 b6 17.Rie1 Fc7 18.Bxe7 Rixe7 19.Fa6 Bc6 Svartur hevur ongar trupulleikar og afturfyri hevur hann finnu meir... 20.Ric2 Bxg2 21.Kxg2 Rid7 22.Fa3 Ric5 23.Rib3 Ne6! Hvíti kongurin stendur nakað berur og tað hevur Martin ætlanir at gera okkurt við! 24.Kg1 Rig6 25.Rib4 Fd7 26.Fa4 Fd8 27.Rid2 Fg5 28.Rif3 Fh5 29.Rid5 e4!? Áhugaverd ætlan, sum framhaldandi, ífylgju Fritz 7, gevur svørtum fyrimun 30.dxe4 d3 31.Ra3 dxe2 32.Fc2 Rfe8 33.Fxe2? Re1 var helst ein betur roynd 33...Rig5! 34.Rid4 Fxe2 35.Rixe2 Rxe4 36.Riec3 Rxc4 37.Rxb6 Re8 38.Rxa7 Tykist kanska sum hvítur hevur loyst trupulleikarnar, men nú verður hvítur faktiskt skák og mátaður! 38...Re1+ 39.Kg2



Støðumynd eftir 39.Kg2

39...Rih4+! Og altjóða meistarin gavst orsakað av 40.gxh4 Rg4++ 0—1

# Martin og Hans Kristian í Dubai

**Talvfjakkararnir eru á øðrum ári á rað í Dubai og luttaka í stórsligu kappingini Dubai Open. Martin Poulsen hevur innan seinasta umfar góðan møguleika at vinna sær sín fyrsta IM-norm**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Eins og í fjør, vendu Martin Poulsen og Hans Kristian Simonsen eyguni móti miðeystri, beint sum FM fyri einstaklingar var av. Eftir FM er venjingarstøðið í øllum førum á góðari leið og tí er tað lag á manni at byggja víðari uppá tað.

Í Dubai Open 2004 gekk tað væl hjá føroyingunum, tó uttan at nakar var tætt við normin. Í ár er søgan ein onnur. Martin hevur møtt sera sterka mótstøðu, millum annað tveimum stórmeistarum og fimm altjóða meistarum, og hevur fýra stig innan níggjunda og seinasta umfar.

Vinnur Martin týsdagin ímóti IM Hameed (2371), er fyrsti IM-nomur hansara veruleiki. Hóast hann hevur svarta fólkið í hesum lagnutalvi, eru kjansirnir góðir. Eitt nú vann hann hegnisliga við júst svarta fólkinum í sætta umfari ímóti sterkum altjóða meistara. Sí talvið hesa vikuna.

Hans Kristian hevur higartil eisini telvað eina góða kapping. Hann hevur eins og Martin fýra stig, men hevur ikki hitt eins sterka mótstøðu sum vinmaðurin. Sjálvt um Hans Kristian vinnur í seinasta umfari á IM Fouad (2458), verður tað ikki nóg mikið til ein norm.

Landsliðsvenjarin hjá føroyska olympiaduliðnum í fjørheyst, Sergey Kayumov, luttekur eisini í Dubai Open. Sergey er altjóða meistari og hevur í løtuni 2400 ratingstig. Hann hevur 4,5 stig undan seinasta umfar.

Heili níggju telvarar eru fremstir við seks stigum. Martin og Hans Kristian eru á deildum 65. plássi av tilsamans 146 luttakarum.

### Framgongd og normjagstran

Martin hevur saman við Hans Kristiani seinastu árini roynt seg í fleiri altjóða talvkappingum. Felags fyri báðar er, at teir ikki rættiliga hava brotið múrin. Sum oftast hava teir fingið miðalgóð úrslit.

Hyggja vit at altjóða ratingtølunum hjá teimum fyri tveimum árum síðani og samanbera tey við núverandi støðu, er støðan hendan: Martin hevði 2239 í altjóða rating í apríl 2003 og í dag hevur hann 2285. Ein framgongd uppá 46 ratingstig. Hans Kristian hinvegin hevur eina framgongd uppá nærum 100 ratingstig (2224-2317).

Báðir brúka nógva tíð og orku uppá talv og royna av øllum alvi at fáa eitt gjøgnumbrot. Tí eru teir neyvan heilt nøgdir við seinastu árini, hóast teir hava framgongd at vísa á. Vónandi hevur Martin brotið eitt petti av múrinum týskvøldið.

# Todi til Tróndheim

**Føroyski álopsspælarin hevur fingið boð um at vera við á Noregs túrinum, nú fleiri av føstu monnunum hava givið avboð**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Tað hevur verið friðarligt kring fótbóltslívið hjá Toda Jónsson í vár. Væl meiri friðarligt, enn tað nakrantíð hevur verið, síðani hann á sumri í 1993 flutti til Danmarkar og í Lyngby fór undir miðvísa arbeiðið at røkka upp í fremstu røð.

Síðstu stóru vikuna hevur einki verið at hoyrt um dystir hjá Toda. Men nú hevur hann fingið boð. Eftir FCK venjingina mánadagin vórðu nítjan spælarar úttiknir til dystin í annaðkvøld, og Todi er millum hesar nítjan.

FCK hevur knívin á strúpanum, tá ið teir í annaðkvøld skulu spæla í Tróndheimi. Mótstøðuliðið er Rosenborg, og tað verður í Royalu kappingini, at stríðið fer at standa. Í millumumfarinum hevur FCK tapt 1-0 í Malmø og á heimavølli ímóti Rosenborg var úrslitið 2-2. Um føroyska útisetafelagið skal hava møguleika at røkka í finaluna, so er neyðugt hjá teimum at vinna í annaðkvøld.

Fleiri av teimum, sum hava spælt nógv í fýra teimum fyrstu landskappingardystunum síðani vetrarsteðgin, eru ikki tøkir undan uppgerðini í Tróndheimi. Talan er um miðverjan og liðformannin, Bo Svensson, sum er hælskaddur, vongverjan Lars Jacobsen, sum er leikbannaður, miðvallaran í høgru, Michael Silberbauer, sum hevur brotið kjáklabeinið og ikki verður førur fyri at spæla næsta lítla mánaðin og so álopsspælaran og eyka liðformannin, Peter Møller, sum hevur trupulleikar í nakkanum.

Umframt Toda Jónsson eru tríggir aðrir álopsspælarar í ferðalagnum. Teir eru Zuma og Álvaro, sum vóru á vøllinum allar 90 minuttirnar sunnudagin, og sum vóru sera væl upplagdir, og Jesper Bech, sum sunnudagin varð innskiftur beinanvegin fyri Michael Silberbauer og sum stóð seg rættuliga væl.

- Álopsspælararnir stóðu seg sera væl ímóti Brøndby. Um eg skal á vøllin, og hvør leikluturin hjá mær møguliga fer at verða, veit eg einki at meta um, sigur Todi Jónsson á heimasíðu síni.

Í landskappingini skal FCK næsta vikuskifti spæla á útivølli ímóti AGF, og Brøndby, sum nú hevur rættuliga stórt trýst á sær, skal spæla á útivølli í Viborg.

## Manglandi fakta

Av misgávum vóru hagtølini fyri sigurin hjá KÍ í Gøtu ikki í blaðnum í gjár. Tey verða prentað niðanfyri, soleiðis at trúgvi lesarin eisini hevur fingið hesi.

-jm

GÍ-KÍ 1-2 (0-0)
0-1: Heðin á Lakjuni 65.
1-1: Súni Olsen 84.
1-2: Atli Danielsen 87.
Dómari: Birgir Sondum
GÍ: Hallur Hansen - Hans Pauli Petersen, Robert Rzeczycki (Kaj Ennigarð, 63.), Atli Gregersen, Bjarni Justinussen - Áslakur R. Petersen, Símun Louis Jacobsen, Súni Olsen, Poul Henning Jacobsen - Sámal Joensen, Poul Arni Jacobsen (Krzysztof Popczynski, 68.)
Gult kort: Atli Gregersen, Robert Rzeczycki
Reytt kort: Kaj Ennigarð 86.
KÍ: Karstin Joensen - Leon Bjartalíð (Jan Andreassen, 70.), Ovi Nysted, Niclas Niclasen, Eyðun Klakstein - Kristoffur Jacobsen, Høgni Madsen, Atli Danielsen, Heðin á Lakjuni - Hjalgrím Elttør (Julian Samuelsen, 80.), Erling Fles
Gult kort: Niclas Niclasen, Høgni Madsen

## Skotið sleppur kanska við

Nýggjasta skotið á føroysku fótbóltsstammuna – Skotið úr Havn – varð stovnað í vár, men tá felagið varð stovnað somikið seint, eru teir ikki partur av kappingini, sum varð løgd til rættis, áðrenn Skotið var stovnað.

Nú hevur FSF tó gloppað dyrnar fyri nýggja felagnum. Í rundskrivi um kappingini verður sagt, at um lið tekur seg úr kappingini í 4. deild, verður plássið hjá hesum liði latið Skotinum. Samstundis verður heitt á feløg, sum møguliga ikki kunnu manna lið til 4. deild, um at siga FSF frá hesum sum skjótast.

-jm

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Sterkir telvarar hittast í Suðuroy

**Nú skal Suðuroyggin av álvara setast á altjóða talvkortið**

TALVKAPPING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Nú skal Suðuroyggin setast á altjóða talvkortið. Og startskotið til tað verður í summar.

Í summar er ætlanin at skipa fyri stórari, altjóða talvkapping í Suðuroy.

Tað, sum liggur í kortunum í løtuni er at "Suðuroy International" skal byrja eina góða viku fyri jóansøku og so at enda kappingina við einum ordans brakið sjálva jóansøkuaftan.

Ætlanin er at kappingin skal vera eitt afturvendandi tiltak og næstu ferð er ætlanin at hon skal vera í Vági, sigur Rani Nolsøe, sum er ein av fyrireikarunum.

Hóast Suðuroy mangan hevur havt sera sterkar telvarar, er synd at siga, at Suðuroyggin er serliga frammaliga í telving sum heild og felagslív er onki av. Eitt endamál við kappingini er at vekja áhugan fyri telving í Suðuroy og kanska at fáa eitt talvfelag á føtur í Suðuroy.

Listin yvir telvarar, sum vera við í kappingini er ikki heilt klárur enn. Men sterki, lokali telvarin, John Rødgaard er sjálvskrivaður.

Men av føroyskum telvarum kunnu nevnast Flóvin Tór Næs, nýklakti føroyameistarin, Carl Eli Nolsøe Samuelsen verður við og Heini Olsen verður eisini við.

Tað er eisini greitt at sera sterki svenski telvarin, Emil Hermansen verður við.